Stórur spenningur um Cambobrunn:

Bora nú næsta brunnin við markið

Mong av altjóða oljufeløgunum bíða nú í spenningi eftir at vita, hvussu hevur gingist við Cambobrunninum, sum júst er liðugt boraður skamt frá føroyska markinum. Er hann eitt veruligt fund kann tað seta gongd í aftur leitingina á Atlantsmótinum og harvið eisini við Føroyar

OLJULEITING
Jan Müller

Eitt av heimsins best útgjørdu boriskipum West Navigator er nú liðugt við at bora avmarkingar- og kanningarbrunn fyri Amerda Hess samtakið í bretskum øki, skamt frá føroyska markinum. Talan er um Cambofeltið, ið varð funnið herfyri og sum verður mett at goyma olju og gass í lønandi mongdum. Men hesin brunnurin skuldi so staðfesta, um talan er um eitt veruligt fund. Tað er ómøguligt at fáa nakað at vita um brunnin. Feløgini halda allar upplýsingar sera tætt inn at sær. Hvørki í Havn ella í Aberdeen vilja tey siga nakað. "Tight hole" er einasta svarið. Og hóast brunnurin hevur fyrsta prioritet hjá øllum oljufeløgum, sum ætla sær at gera ílogur í leiting á Atlantsmótinum næstu árini, so ber ikki til at fáa nakað at vita. Hetta er annars brunnurin, sum hevur verið nógv umrøddur í oljuverðini, tí er hann eitt veruligt lønandi fund, kann hann fáa gongd á aftur leitingina sum heild á Atlantsmótinum. Umframt Amerada Hess eru eisini Dong og ChevronTexaco og OMV við í hesum brunninum.

Nú er boriskipið so farið nakar longur norðureftir, har tað skal bora Rosebank prospektið. Her er tað ChevronTexaco, sum er fyristøðufelag. Eisini eru Statoil og aftur Dong við í tí boringini. Sosialurin skilur, at hol varð sett á fyrst í hesi vikuni. Hetta er annars tann brunnurin, sum ein av stjórunum í Chevron Texaco úttalaði seg um í Sosialinum á oljuráðstevnuni í Havn herfyri. Hon segði, at hetta er ein brunnur, sum feløgini hava stórt álit á. Hon segði eisini, at møguleikin at gera eitt lønandi fund her var sera stórur, eitt til trý.

Tað er greitt, at úrslitið av báðum hesum brunnunum, kann fáa stóran týdning fyri áhugan fyri at vera við í 2. útbjóðing á føroyska landgrunninum. Tað kann so ganga báðar vegir.

Í august er so ætlanin at fara undir at bora triðja brunnin við markið. Tað er BG, sum stendur fyri tí brunninum, ið ber heiti Bedlington. Hann liggur nakað væl longur syðri, men framvegis tætt upp at føroyska markinum. Í tí boringini er eisini føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum umframt onnur feløg.

Uppaftur ein áhugaverð boring hevur verið vestan fyri Hetland í ár, sum eisini kann hava týdning fyri okkara øki. Tað er avmarkingarbrunnurin í Laggangassfeltinum. Eisini hann hevur "tight hole" status. Har er tað Total, sum er operatørur. Eitt gott úrslit her kann fáa týdning fyri 22. útbjóðingina í bretskum øki, har tað nettupp verður lagdur stórur dentur á at bjóða út øki í nánd av gassfundum. Vónirnar eru so, at tá man hevur funnið so mikið mong smærri og størri gassfelt, at man kann fara undir at byggja ein infrastruktur og síðani at seta í gongd framleiðslu av gassi.

Um somu tíð sum alt hetta hendir nærkast dagurin fyri upplatingini av 2. rundu á føroyska økinum. Tað verður tann 17. august. Annars fara vit skjótt at frætta um hvørji oljufeløg hava fingið tillutað hvørji øki í bretsku 22. runduni og norsku 18. runduni. Hetta er alt ein útviklingur, sum so ella so kann hava áhuga og týdning fyri okkara egnu vónir til framhaldandi leiting á landgrunninum.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag

Vika 30, 2004
www.kaupthing.fo

Prísvøksturin varð lægri enn væntaður

MARKNAÐARRÁK

Farna vika gjørdist friðarlig á virðisbrævamarknaðunum hóast lánsbrævarentur og partabrævaprísirnir fullu eitt sindur. Týdningarmestu tíðindini bórust um kjarnuprísvøksturin í USA, sum vísti eitt fall í farna mánað uppá 0,1% í mun til 0,2% sum væntað. Hetta fekk renturnar at falla. Danska 10- ára rentan fall soleiðis 0,06%-stig fríggjardagin og liggur nú á 4,35%, sum er tað lægsta síðan fyrst í mai mánað. Somuleiðis vóru roknskapir kunngjørdir samstundis sum prísurin á olju náddi sítt hægsta í seks vikur og fekk hetta partabrøvini at falla.

Kjarnuprísvøksturin hevur serligan áhuga, tí hesin íroknar ikki olju og matvørur sum órógva myndina, vegna teirra stóra prísveiggj. Kjarnuprísvøksturin gevur eina neyvari ábending, um tað er eitt vaksandi prístrýst í búskapinum. Um kjarnuprísvøksturin sveiggjar millum 0,1% og 0,2% um mánaðin, svarar tað til ein árligan prísvøkstur undir 2%, sum hóskar væl til hóvliga rentupolitikkinum hjá amerikanska tjóðbankanum.

Miðbankin í Evropa (ECB) hevur ongar ætlanir um at hækka rentuna, hóast árligi prísvøksturin sum væntað gjørdist 2,4% og er tí yvir loftinum sum ECB hevur sett til 2%. Hetta tí prísvøksturin einamest stavar frá hækkandi olju- og rávøruprísum og vaksandi útflutningi, og ikki frá øktari nýtslu í Evropa.

KT-fyritøkurnar DELL, IBM og Intel kunngjørdu góðar roknskapir. Men Intel boðaði frá, at fyritøkan væntaði minkandi marginalar framyvir og fekk hetta, saman við boðum frá amerikanska orkuráðnum um fallandi oljugoymslur, lánsbrævarenturnar og partabrøvini at falla, so amerikanska Nasdaq vísitalið kom í nánd av tí lægsta í ár.

Nógv fólk er farið í summarfrí og tí verður komandi vika helst friðarlig um einki óvæntað verður. Týdningamesta hendingin hesa vikuna, sum kann ávirka virðisbrøvini, verður tá amerikanski tjóðbankastjórin Greenspann fer at halda røðu fyri kongressuni. Væntandi fer hann at halda fast um hóvligu rentuhækkingina og fer kanska at boða kongressina frá, at vánaligu nýtslu- og arbeiðsloysistølini fyri juni einans vóru sveiggj, sum ikki ávirka heildarmyndina av einum annars tryggum búskaparvøkstri

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,00%	0,00%
2 ára lánsbrævur	2,61%	-0,02%
5 ára lánsbrævur	3,70%	-0,02%
10 ára lánsbrævur	4,36%	-0,02%

Partabrævavísitøl

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	269,7	1,0%
OMX, Svøríki	675,1	0,9%
Eurostoxx 50, Evropa	2.713,3	-1,7%
S&P 500, USA	1.101,4	-1,0%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	105,13	0,0%
Evru Lánsbrøv	165,95	-0,1%
Norrøn Partabrøv	77,13	-3,1%
Altjóða Vøkstur	61,11	-0,8%

Gjaldoyru

	Kursur	+/- %
USD	598,23	-0,2%
EUR	743,51	0,0%
GBP	1.119,17	0,3%
NOK	87,70	-0,2%

Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.

Til skrivstovu okkara

sóknast vit eftir einum fyrikomandi, ágrýtnum og álítandi fólki at arbeiða 1/2 tíð (fyrrapart).

Starvið umfatar í høvuðsheitum vanligt skrivaraarbeiði so sum umsiting av sølu-/keypsavtalum og øðrum avtalum, nakað av bókhaldi og annars fyrifallandi arbeiðsuppgávur frá leiðsluni.

Tann, ið settur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, og tað er ein treyt, at viðkomandi hevur skrivstovu- ella líknandi útbúgving og hevur arbeiðsroyndir.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 26. juli. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Tørvar tær meira kunning um starvið, ber til at ringja til P/f Poul Michelsen á tlf 31 46 50 og tosa við Niels Juel Arge, fíggjarstjóra. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

P/F Poul Michelsen

TENNISVENJING

Tennisvenjing verður nú aftur hvønn mikudag og fríggjadag kl. 17.00-18.30 á vallunum í Gundadali. Byrjað verður mikudagin tann 21. juli. Øll eru hjartaliga vælkomin, eisini tey í enn ikki hava teknað seg sum lim. Møguleiki er fyri at lána ketcharar. Eisini er møguligt at bíleggja persónliga venjing hjá Martin Simonsen 271449 og Jón Brekku á 224929.

Havnar Tennisfelag

Tømrere & snedkere

søges til opbygning af lejl. i København City.

Bolig kan evt. anvises.

Ring +45 20 48 20 40

Kim Hansen, Rytterhuset

Sosialurin

Arbeiðseftirlitið
Occupational Safety and Health Adminstration

Summarfrí

Frá og við mánadegnum 26. juli
og til og við fríggjadagin 6. august
er Arbeiðseftirlitið stongt vegna summarfrí.

Falkavegur 6
P.O. Box 1134
FO-110 Tórshavn
Faroe Island
Tlf. +298 357811
Fax + 348 357810
www.arb.fo
arb@arb.fo

Ferielukning

Kontoret er lukket p.g.a. ferie fra 12. juli til og med 4. august.

Vi kan dog kontaktes på tlf. (0045) 4036 4465.
Her kan også sendes en SMS-besked.

***Grannskoðaravirkið Højmose,* FRR**
v. Børge Christiansen, Cand.merc.aud.
Reg. Revisor
Í Heiðum
370 Miðvágur
Tlf 333498, telefax 333490
E-mail: hoejmose@post.olivant.fo
Http.// www.rev-hoejmose.dk

Útbjóðing

Vegagerð í Viðareiðis Kommunu

Fyri Viðareiðis Kommunu verður arbeiðið at gera 150 m av vegi boðið út alment.

Arbeiðið verður boðið út sum ein arbeiðstøka:

Jørð-, regnvatns- og kloakkarbeiði

Arbeiðið fevnir í stórum um at grava fyri, spreingja og gera 8,0 m breiðan veg og gongubreyt, at leggja regnvatns- og kloakkleiðingar, harumframt at fyrireika vatnleiðing til nýggja útstykking.

Útbjóðingartilfarið fæst frá fríggjadegnum 23. juli við at gjalda kr. 3.000,- í veð á konto 4132607 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mikudagin tann 21. juli og venda sær til Sp/f Fuglø Arkitektar við váttan um, at upphæddin er goldin.

Lisitatiónin verður mikudagin 18. august í ár kl. 14.00 á skrivstovuni hjá Viðareiðis Kommunu. Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

FUGLØ ARKITEKTAR
Gerðagøta 12, Postsmoga 1,
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 78 87 - Fax 45 78 97
fuglark@fuglark.fo

Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir ídnaðarlaboranti til starvsstovu okkara til setan 1. oktober 2004 ella eftir nærri avtalu.
Starvið er eitt fulltíðaravloysarastarv.

Starvið umfatar m.a. rávørueftirlit, eftirlit av lidnari vøru og framleiðslu av reagensum.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eyðhild Christiansen ella Jonnu Hansen á tlf. 341100.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera Apotekinum í hendi áðrenn 1. september 2004.

Tjaldurs Apotek
Postsmoga 3010
110 Tórshavn

MENTAMÁLARÁÐIÐ

Summarfrí

Sagt verður frá, at Mentamálaráðið er stongt vegna summarfrí frá mánadegnum 26. juli til fríggjadagin 6. august 2004, báðir dagar íroknaðir.

Mentamálaráðið

Summarfrí

Skrivstovan er stongd í viku 31, frá 24. juli til 2. august 2004.

Føroya Arbeiðarafelag

Frisørsalongin á Høgaból

Er stongd vegna summarfrí frá 28. juli til 23. august.

Jógvan Hansen
Runavík
Tlf. 447575

Motorsúkkla til sølu

Honda Revera NTV 600, árg. 91, í góðum standi til hægst bjóðandi. Prísuppskot uml. 35.000 kr.

Tlf. 456413